# Nógv spennandi til børnini



Lesið meiri á síðu 12

## - Lalandia hevur nakað til øll, serliga til børnini, sigur Ása Beder, sum saman við familju síni vann eina ferð hagar gjøgnum Summarkappingina hjá Sosialinum og Rás2

Tú kanst altíð svimja í Lalandia, tí alt er innandura og tað er okkurt spennandi til øll børn, í øllum aldri.

– Stórir og smáir rutsjibanar, stórir og smáir hyljar eisini til tey heilt smáu, har vatnið er deiliga heitt.

– Tú kanst eisini fara út í boblibað, um tú heldur vilt verða uttandura, greiðir hon frá.

Tey vaksnu, sum ikki hava hug at svimja í baðilandinum alla tíðina, kunnu heldur fáa sær ein bita, ella fáa sær ein blund á sólstólunum.

**LÆRLINGUR**
**TIL NOA NOA Í TÓRSHAVN**

Noa Noa søknast eftir einum ágrýtnum og sjálvstøðugum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving innan okkara spennandi yrki. Ert tú ein útatvendur persónur ið dámar væl móta og at verða kreativ/ur er hettar rætt starv fyri teg.

**Okkurt um teg:**
- Fyri at fáa læripláss innan hettar yrki mást tú hava handilsskúla (FHS).
- Vit vænta av tær at tú ert ágrýtin og sjálvstøðug/ur.
- Hevur hug at arbeiða við móta og ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum:**
- Vit bjóða eitt starv í einum nýtímans handli, ið leggur stóran dent á, at mótin og tænastan eru í hásæti.
- Arbeiðsviðurskiftini eru góð við fjølbroyttari arbeiðsgongd.
- Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd innan hettar yrki!

**Umsókn:**
- Um hettar freistar teg so send okkum eina stuttoraða lýsing av tær.
- Freistin fyri at senda umsókn inn er 30. maj 2011.
- Vit gleða okkum at hoyra frá tær og bíða gjarna eftir tí rætta.

NOA NOA®

Niels Finsensgøta 11
Boks 271
110 Tórshavn
Tlf. 281706

